VÍÐKAÐA FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
MAI - JUNI 2006
SKRIVLIG FRAMSETING

Tikið myndina hevur Regin Ellingsgaard

4 tímar

Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.

Vel eitt av hesum evnum:

1 **Beinið revsingarrættin burtur**

2 **Prutl og koyrikort**

3 **Tíggjundi flokkur**

4 **Úr mjørkanum - inn í ljósið**

5 **Skrivifrælsi, talufrælsi, trúarfrælsi**

1

Beinið revsingarrættin burtur

Les tekstin niðanfyri

- Sig tína hugsan um at taka av rættin hjá foreldrum / verjum at revsa børn síni likamliga („varislig likamlig revsing") – millum annað við støði í tekstinum niðanfyri – og minst til at grunda tíni sjónarmið

Níggju uppskot til ungdómstingið

6. februar 2006 var hildið ungdómsting í Løgtinginum, har sum næmingar úr fólkaskúlanum kundu leggja fram uppskot til løgtingslógir. Níggju ymisk uppskot vórðu løgd fram. Eitt teirra, sum 9.a í Eysturskúlanum í Havn legði fram, snúði seg um við lóg at banna foreldrum / verjum at revsa børn síni likamliga

Ár 2006, 6. februar, løgdu næmingar úr 9.a í Eysturskúlanum í Havn fram soljóðandi

Uppskot

til

løgtingslóg um at avtaka revsingarrættin

1. §. Tað er strangliga bannað foreldrum / verjum at sláa børn síni. Eisini, tá ið talan er um varisliga likamliga revsing, sum er partur í uppalingini.

2. §. Tann, sum slær barn sítt, fær eina ávaring, og kravt verður, at hann ella hon fer í viðgerð, fær frálæru í uppaling og lærir at loysa trupulleikar.

3. §. Um myndugleikarnir verða varugir við, at harðskapurin ímóti barninum heldur fram, kann stig verða tikið til, at barnið verður latið í familjurøkt, av tí at heimið er ikki hóskandi til børn.

4. §. Henda løgtingslóg fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Viðmerkingar til lógaruppskotið:
Endamálið við lógaruppskotinum er at vara øll føroysk foreldur við, at tað verður ikki góðtikið, at likamlig revsing er partur í uppalingini, heldur ikki varislig likamlig revsing.

Í Føroyum er loyvt foreldrum / verjum at sláa børn síni, av tí at tað verður hildið at vera ein partur í uppalingini. Tað er ein gomul donsk lóg, sum loyvir hetta. Henda lóg er broytt í Danmark, men varð ikki broytt í Føroyum samstundis. Tí er enn loyvt foreldrum / verjum at harta børn síni við varisligari likamligari revsing.



Grundir fyri ikki at sláa børn:

- Tað er heilsuskaðiligt hjá børnum at verða sligin!
- Børnini læra, at harðskapur er ein máti at loysa trupulleikar!
- Børn eru veikari enn vaksin og fáa ikki vart seg!
- Hvar er markið fyri, nær talan er um harðskap og um varisliga likamliga revsing?
- Børnini missa sjálvsálitið, fáa sálarlig arr!
- Barnarættindasáttmálin er eisini galdandi hjá føroyskum børnum!
- Er talan um „revsing", tá ið revsingin er „likamliga varislig"?
- Heldur enn at revsa eiga foreldur at práta við barnið og greiða frá um rangt og rætt!
- Hví er loyvt at sláa børn, men ikki djór og ikki vaksin fólk!?
- Foreldrini eiga at verja barnið – barnið er ikki ogn teirra, tí fólk kunnu ikki „eiga" fólk!
- Øll børn hava rætt til virðiliga viðferð!
- Sambandið ímillum foreldur og børn verður merkt av ótryggleika, leggja tey hond á børnini!
- Vaksin, sum sláa børn, mugu fara á skeið at læra seg at vera foreldur!
- Tað er mannminkandi og eyðmýkjandi at verða sligin, bæði hjá vaksnum og børnum!
- Tað er veikleikatekin, megnar tú ikki at práta eitt barn til sættis!
- Tað er tekin um einaveldisligan uppalingarhátt at sláa børnini – tað er ódemokratiskt!
- Foreldrini eiga ikki at missa tamarhaldið á sær – so eru tey vánalig fyrimynd!
- Í Norðurlondum er revsingarrætturin avtikin:

Í Svøríki 1979
Í Finnlandi 1983
Í Noregi 1987
Í Danmark 1997

(Dimmalætting 20. januar 2006, tillagaður tekstur)

2

Prutl og koyrikort

Les tekstin

- Ger tínar viðmerkingar til tekstin
- Hvat heldur tú um tilmælið frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd?
- Kom við tínum egna tilmæli, kanska tað vinnur frama, øll skilagóð hugskot eru vælkomin

Prutl, motorsúkklur og koyrikort

Hóast tann vanliga súkklan ikki verður serliga nógv nýtt í Føroyum longur, so er øðrvísi vorðið, tá talan er um prutl og motorsúkklur, sum serliga hesi seinastu árini eru vorðin nógv fleiri í tali.

Tey, sum koyra prutl og motorsúkklur, hava, sum kunnugt, nógv størri sannlíkindi at verða skadd í ferðsluni enn tey, sum koyra í bilum og bussum, tí fólk á prutli og motorsúkklum eru nógv verri vard enn hini.

Prutl

Tað eru, sum vera man, serliga ungdómar, sum koyra á prutli, og hóast kravt er 16 ára aldursmark at koyra hetta akfarið, so er eingin ivi um, at tað eru rættiliga nógv, sum als ikki eru komin til hetta lógarásetta aldursmarkið, sum longu koyra á prutli í ferðsluni. Harafturímóti verður ikki kravt, at viðkomandi hevur fingið eina skipaða undirvísing, áðrenn formligt koyriloyvið frá myndugleikunum verður latið.

Lítið prutl

Sum kunnugt er støddin á prutlum nú eisini ymisk. Tað eru „smá prutl", sum ikki kunnu koyra skjótari enn 30 km/t.

Stórt prutl

Nú eru eisini „stór prutl", sum kunnu koyra 45 km/t, í ferðsluni.

Lítil og stór motorsúkkla

Eins og munur er á prutlum, so er eisini munur á motorsúkklum, hildið verður tí eisini skilagott at skilgreina markið millum smáar og stórar motorsúkklur.

Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur hetta <u>tilmælið</u>:

- at loyvt skal verða 15 ára gomlum at fáa koyrikort til prutl,
- at ein skipað koyrifrálæra, ið bæði skal fevna um tann ástøðiliga (teoretiska) og verkliga partin (at læra at koyra), verður lokin, og
- at koyrifrálæruprógv frá koyrilærara verður latið eftir nøktandi koyriroynd,
- at 16 ára gomul kunnu fáa koyrikort til *stór* prutl,
- at ein skipað *víðkað* koyrifrálæra, ið bæði skal verða ástøðilig og verklig, verður lokin
- at koyrifrálæruprógv frá Akstovuni (Bileftirlitinum) verður latið eftir nøktandi koyriroynd, og
- at áseta aldursmarkið at fáa koyrikort til smáar og stórar motorsúkklur til ávikavíst 18 og 21 ár.

(Úr: Ávegis til nullhugsjónina – Ráðið fyri Ferðslutrygd 2003)

3

Tíggjundi flokkur

Les tekstin niðanfyri

- Skriva, millum annað við støði í tekstinum, hvussu tú heldur, at 10. flokkur átti at verið skipaður í tínum skúlaøki

Tíðin er komin at taka eitt stórt tak 10. flokki at frama

Tað eru skúlar, ið royna eftir førimuni at bjóða næmingunum eitt gott skúlaár. Og meir enn so hava einstakir skúlar roynt seg við spennandi breytum og verkætlanum. Tí haldi eg, at tíðin er komin til at taka eitt stórt tak 10. flokki at frama.

Tað liggja nakrar gamlar ætlanir fyri 10. flokk, minnist meg rætt. Eftir mínum tykki áttu tær at verið avstøvaðar, so at royndarvirksemi varð sett í verk eftir hesum leisti:

Fimm stórir 10. floks skúlar: ein í Havn, har eisini Sandoyggin er uppií, ein í Klaksvík, ein vesturi í Vágunum, har eisini Vestmanna er við, ein í Suðuroynni og ein í Eysturoynni.

Royndir við smærri eindum enn hesum, her eru nevndar, kundu eisini verið. Karmarnir um skúlan kundu verið aðrastaðni í býnum / bygdini enn í sjálvum skúlanum. Skúlatíðin kundi verið arbeiði í býnum / bygdini, samantvinnað við verkætlanum og møguleika hjá næmingunum at taka víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans.

Og í staðin fyri at síggja tað sum ein vansa, at vit liva í okkara lítla oyggjasamfelag, kundu vit roynt at vent tí okkum til fyrimunar. Tá krevst, at okkara skúlamyndugleikar taka ábyrgd av at veita 10. flokki betri sømdir.

Tað er stór synd at leggja eftir 10. flokki og nevna hann tíðarspillu, áðrenn vit rættiliga hava roynt at gera hann til eitt veruligt tilboð til ungdóm okkara. Eg ivist onga løtu í, at tey ungu vilja sjálvi gera sítt til at byggja upp ein góðan 10. flokk, um tey vórðu boðin við í ráðleggingararbeiðið.

(Úr grein eftir Gyðju Hjalmarsdóttur, Skúlablaðið 5 / 2005)

4

Úr mjørkanum - inn í ljósið

- Skriva um evnið

Úr mjørkanum - inn í ljósið



5 Skrivifrælsi, talufrælsi, trúarfrælsi

- Skriva um evnið